# GERÐABÓK

**Dato: 6. oktober 2005**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 192/05-209/05**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jan Christiansen
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Inga Dahl
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Kári Árting
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**
Bjarti Mohr

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**192/05** **2005-0017**

**Jógvan Arge hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Kári Árting, eru loknar.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt.

**193/05** **2005-0038**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 6. oktober 2005:** Tikið til eftirtektar.

**194/05** **2005-0458**

**Broyting av byggisamtyktini fyri Kollafjørð soleiðis at F-vinnuøki á Oyrareingjum verður broytt til B1-havnaøki.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í 2004 var samtykt at broyta byggisamtyktini fyri Kollafjørð soleiðis, at heitini og ásetingarnar fyri tey ymisku økini verða tey somu sum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu (j. nr. 200400613).

Í hesi broytingini var omanfyri nevnda øki á Oyrareingjum broytt frá F-vinnuøki til B3-vinnuøki.

Henda broyting er enn ikki endaliga góðkend í Innlendismálaráðnum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt sambært kortskjali.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. mars 2005:** Ein minniluti, Leivur Hansen, mælir til at taka undir við býararkitektinum og at beina málið í kollfjarðarnevndina.

Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Bjarti Mohr, samtykti at beina málið í kollfjarðarnevndina.

**Kollfjarðarnevndin 14. mars 2005:** Samtykt at mæla til at taka undir við býararkitektinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt sambært kortskjali.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mars 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum og at broyta byggisamtyktina sambært kortskjal dagfest 17. mars 2005.

**Býráðið 21. apríl 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
5. august 2005 var seinasta freist at mótmæla broytingini av byggisamtyktini á Oyrareingjum. Inn eru komin 2 mótmæli.

Annað mótmælið er frá Regini og Paulinu av Steinum. Hetta viðger mest navnið "havnalag á Oyrareingjum". Eftir teirra meting ber tað ikki til at tosa um havnalag á Oyrareingjum, tí at Oyrareingir liggur langt frá fjøruni. Heldur átti navnið verið havnalag ella bryggja fram við Oyrareingjalandinum ella undir Oyrareingjalandinum.

Hitt mótmælið er frá Thomas Arabo, Øssur av Steinum, Olaf Petersen, Magna Hansen, William av Vollanum, Hans Jacob Simonsen, Poul S. Samuelsen og Annu R. Jakobsen.

Hetta mótmælið viðger m.a. árin á umhvørvið, liviumstøður, larm, minkandi húsavirði v.m. í sambandi við bygging av bingjuhavn í økinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at málið verður sent til havnanevndina til viðmerkingar

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum.

**Ískoyti:**
Tann ítøkiliga avgerðin, sum Tórshavnar kommuna hevur tikið støðu til, kann lýsast við, at kommunan fær eina týðandi havnaútbygging fyri minst møguligan kostnað og við minst møguligum inntrivum í náttúruna og helst ongum eyka ampa samanborið við umstøðurnar í dag fyri borgararnar kring havnina.

Í kæruni er uppskot um at leggja havnina úti á Sperm.

Víst verður til útdýpandi viðgerð í skrivi j. nr. 2005-1822/2 har m.a ein eftirmeting av útbyggingarmøguleikunum úti á Sperm og Oyrareingjum er gjørd.

**Tilmæli frá havnameistararanum**:
Mælt verður til at halda fast við ætlaðu broytingina í byggisamtyktini.

**Havnarnevndin 29. august 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollfjarðarnevndin 12. september 2005:** Eftir ynski frá nevndini kunnaði havnameistarin um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Samtykt at halda fast við býráðssamtyktini frá 21. apríl 2005.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og einari ímóti at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Kári Árting, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Inga Dahl, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddi: Beate L. Samuelsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

**195/05** **2004-1649**

**Umsókn frá MAP arkitektum, vegna Almanna- og heilsumálaráðið, dagf. 18.juni 2004, um broyting av Almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu og loyvi til frámatrikulering.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Almanna- og heilsumálaráðið hevur ætlanir um at selja íbúðarbygningarnar, sum standa á økinum hjá Landssjúkrahúsinum á matr. nr. 100a, Tórshavn. Bygningarnir eru 4 í tali, harav ein verður nýttur til umsiting hjá Almanna- og heilsumálaráðnum.

Økið hjá Landssjúkrahúsinum er í Almennu byggisamtyktini útlagt sum D3 øki, sum er kannað stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

Ætlanin er at frámatrikulera og selja íbúðarbygningarnar til privat útleiðingarvirksemi.

Tá D3 økið ikki loyvir privatum leiguíbúðum, er ætlanin at fáa broytt økið til A2 øki, sum í Almennu byggisamtyktini er útlagt til høga bústaðarbygging, tó skal viðmerkjast, at bygningarnir ikki yvirhalda ásetingarnar fyri mest loyvdu hædd.

Ætlanin er tó ikki, at økið við bygningin, sum verður nýttur til umsiting, skal broytast til A2 øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin verður broytt sambært tekning 102, dagf. 18.06.2004, og at nevndin mælir Matrikulstovuni til at loyva frámatrikulering av bygningum frá matr.nr. 1000a sambært tekning nr. 101, dagfest 18.06.2004.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juli 2004:** Málið útsett til nøktandi upplýsingar fyriliggja viðvíkjandi framtíðar parkeringsviðurskifti í sambandi við umsóknina.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið nýggja umsókn, har søkt verður um at frábýta nú tríggjar bygningar ístaðin fyri sum upprunaliga 4. Í nýggju umsóknini verður haraftrat ført fram ynski um, at frávik verður givið til treytir um útvegan av parkeringsplássum. Mett verður í umsóknini, at ikki er neyðugt við meira enn 15 parkeringplássum til hvønn bygning.

Umsitingin hevur havt fund við umsøkjaran, har fingnar eru til vega upplýsingar um bygningarnar og verandi parkeringviðurskifti.

Um bygingarnar kann upplýsast:

| | |
|---|---|
| Bygningur 53 | 60 1-kamaríbúðir |
| Bygningur 54 | 40 1-verilsisíbúðir |
| Bygningar 55 | 25 2-verilsisíbúðir |
| | 5 3-verilsisíbúðir |
| Samanlagt | 130 Íbúðir |

Hetta merkir, at býtið til parkeringpláss í mun til bústaðir vil koma at verða.

| | | |
|---|---|---|
| Bygningur 53 | 60 1-kamaríbúðir | 1/4 |
| Bygningur 54 | 40 1-verilsisíbúðir | 1/3 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bygningar 55 | 25 | 2-verilsisíbúðir | |
| | 5 | 3-verilsisíbúðir | 1/2 |

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at byggisamtyktin verður broytt sambært tekning 102, dagf. 18.06.2004.

Harímóti mælir býararkitekturin frá at ganga umsóknini um at frábýta eftir nýggju umsóknini á møti, vísandi til at hetta ikki er í samsvari við ásetingarnar um krøv til parkering sambært almennu byggisamtykt fyri Tórshavnar kommunu.

Hinvegin kann nevndin, um so er, at hon ynskir at røkka eina loysn í málinum, samtykkja at gera eina serstaka byggiskipan fyri økið, har givið verður frávik í mun til galdandi ásetingar um krøvini til parkering í mun til bústaðir.

Slík serstøk byggiskipan kann grundast á, at talan er um smærri bústaðareindir, - íbúðarbústaðir, har ikki er tikin nóg væl hædd fyri býtinum millum bústaðarslag og parkering í vanligu ásetingunum.

Ein slík serstøk byggiskipan kann hava ásetingar um býti millum parkeringpláss í mun til bústaðir, ið er:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Bygningur 53 | 60 | 1-kamaríbúðir | 1/2 | 30 P-pláss |
| Bygningur 54 | 40 | 1-verilsisíbúðir | 1/1 | 40 P-pláss |
| Bygningar 55 | 25 | 2-verilsisíbúðir | 1/1 | 25 P-pláss |
| | 5 | 3-verilsisíbúðir | 1/1 | 30 P-pláss |

Haraftrat skal treytast, at fyri bygningur 53 skal galda, at um so at støddin á bústaðareindunum broytist til størri eindir, skal ásetingin um býti broytast frá 1/2 til 1/1.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2005:** Nevndin samtykti ikki at ganga umsóknini á møti, tí hon er ikki í samsvari við ásetingarnar um krøv til parkering sambært almennu byggisamtyktini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið áheitan frá umsøkjaranum um at viðgera málið aftur við atliti til at gera eina ætlan fyr økið, sum hevur við sær frávik í mun til galdandi ásetingar til parkering.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til ásetingar fyri økið. Talan er um somu ásetingar, sum býararkitekturin mælti til til fundin 4. apríl 2005.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka undir við tilmælinum frá fundinum 4. apríl 2005.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Til tess at fáa býráðsins heimild til møguliga at fara víðari við málinum samtykti nevndin at leggja fyri býráðið fyri læstum hurðum tilmælið frá býararkitektinum um serstaka byggiskipan fyri økið sambært uppskoti 4. apríl 2005 við hesum ásetingum um parkeringspláss í mun til bústaðareindir.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Bygningur 53 | 60 | 1-kamaríbúðir | 1/2 | 30 P-pláss |
| Bygningur 54 | 40 | 1-verilsisíbúðir | 1/1 | 40 P-pláss |
| Bygningar 55 | 25 | 2-verilsisíbúðir | 1/1 | 25 P-pláss |
| | 5 | 3-verilsisíbúðir | 2/1 | 10 P-pláss |
| Tilsamans | | | | 105 P-pláss |

**Býráðið fyri læstum hurðum 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum og at senda málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Nú er váttan komin frá MAP arkitektum vegna Almanna- og Heilsumálaráðið, um at teir ynskja, at málið verður viðgjørt víðari sambært treytunum, sum byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 13. juni 2005.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu verður broytt sambært kortskjali.

Harafturat mælir býararkitekturin til sundurbýti sambært umsókn j. nr. 2004-1649 við fráviki viðv. hædd og parkeringsplássum treytað av, at ásetingar um tal av parkeringsbásum verður tinglisið í skeytini og kommunan hevur átalurætt.

| | |
|---|---|
| 1-kamaríbúðir | 1/2 P-pláss |
| 1-verilsisíbúðir | 1/1 P-pláss |
| 2-verilsisíbúðir | 1/1 P-pláss |
| 3-verilsisíbúðir | 2/1 P-pláss |

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**196/05** **2004-1548**

**Heildarætlan fyri Dr. Jakobsens gøtu/ Sverrisgøtu**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til Heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu, j. nr. 200101579, har lagt verður upp til, at Tórshavnar kommuna, við einum miðvísum arbeiði at menna miðbýin, ger eina miðbýarætlan, ið loyvir meirbygging í miðbýnum við upp til 25%, hevur umsitingin gjørt uppskot til Heildarætlan fyri Dr. Jakobsens gøtu/ Sverrisgøtu, har meirbygging verður loyvd fyri matriklarnar, ið marka upp til gøturnar báðar.

Ætlanin við hesum er at økja um tættleikan kring tað, ið lagt verður upp til skal koma at verða handilgøta/gongugøta í miðbýnum. Sí kortskjal j. nr. 200401464-1.

Økið, ætlanin fevnir um, skal síggjast sum ein týðandi partur av miðbýarætlanini, har ein nýggj handilsgøta/gongugøta kann koma at virka sum bindingslið millum verandi og komandi miðbýarfunktiónir.

Ein slík gøta fer at verða eitt natúrligt bindingslið millum tvær potentiellar miðbýarlundir við gamla kirkjugarð og verkætlanina um eina miðbýarlund við Tinghúsvegin millum Bøkjarabrekku og Áarvegin, j. nr. 200400607.

Arbeitt hevur verið áður við einari líknandi ætlan, j. nr. 200101692, men bleiv ætlanin tá ikki førd út í verki. Táverandi ætlan bleiv væl móttikin av teimum avvarðandi, men manglandi støðutakan til pakeringstrupulleikar høvdu við sær, at ætlanin var løgd aftur til umsitingina at arbeiða víðari við.

Í dag hevur Tórshavnar kommuna lagt eitt ávíst arbeiði í at útvega fleiri parkeringspláss kring miðbýin, og er tað tískil uppá sítt pláss at henda ætlanin verður tikin fram aftur, nú vísast kann á fleiri parkeringspláss í nærøkinum. Sí kortskjal j. nr. 200401464-2.

Arbeitt hevur somuleiðis verið við at ávísa ferðslumøguleikar millum gøtuna og hesi parkeringsøkir. Sí kortskjal j. nr. 200401464-3.

Heildarætlanin leggur tó upp til, at beinleiðis krav til bilstøðlar á sjálvum matriklinum hjá teimum, har meirbygging verður loyvd, ikki skal setast, - hetta fyri at ætlanin um eina slíka handilsgøtu/gongugøtu skal kunna fremjast. Víst verður á, at sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu *§ 2. Ásetingar fyri 1. Grundumráði, stk. 6*, verður í heildarætlan fyri avmarkað økið, lagt upp til at slíkt frávik kann gevast.

Heildarætlanin loyvir matriklunum, ið marka upp til Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu, eitt byggistig uppá 0,8 og eitt nettunýtslustig uppá 2,0, og er ætlað at liggja sum 1. grundøkið.

Kjallarahæddin verður ikki tald við í nettonýtslustignum, og verður hon roknað eftir leistinum fyri 1. grundøki annars. Hetta hevur við sær, at ásetingarnar fyri økið skulu broytast fyri tann partin av Dr. Jakobsens gøtu, sum í dag liggja sum A1-øki.

Somuleiðis skal heildarætlanin positivt nevnast í almennu byggisamtyktini sum eitt avmarkað øki, har serligar ásetingar eru galdandi.

Uppskot til broyting av ásetingum er lýst á kortskjal j. nr. 200401464-4

Heildarætlanin ásetur, at handlar skulu vera í hæddini við atgongd til gøtuna. Hinar hæddirnar kunnu verða til skrivstovur, smærri virki, sum natúrliga hoyra heima í sambandi við eina handilsgøtu/gongugøtu, stovnar og íbúðir.

Modell í 1:200 er gjørt, ið lýsir ætlanina, sum hon kann taka seg út í samspæl við restina av miðbýnum.

Víst verður í modellinum á, hvussu ein slík gøta kann útvega neyðuga tættleikan, samstundis sum hon hevur røttu staðsetingina til at gerast ein dygdargóð handilsgøta/gongugøta í miðbýnum.

Kortskjøl lýsa hvussu staðsetingin við frástøðu til parkering, busssamband, torg, stovnar og aðrar handlar, stuðla undir gøtuna. Bústaðartættleikin í innara miðbýi stuðlar somuleiðis undir menningina hjá gøtuni. Sí kortskjøl j. nr. 200401464-2,3,4,5 og 6.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin tekur undir við uppskoti um broyting av ásetingunum fyri økið, víst á kortskjal j. nr. 200401464-4, soleiðis at meðan broytingin verður viðgjørd eftir lógarfestu mannagongd, sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, kann arbeiðast víðari við at gera uppskot til ferðsluviðurskifti, útsjónd og aðrar reglugerðir at leggja fyri nevndina aftur.

Víðari mælir býararkitekturin til, at nevndin tekur undir við at umrødda økið, víst á kortskjal j. nr. 200401464-4, skal positivt nevnast í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu § 2. Ásetingar fyri 1. Grundumráði, sum eitt stk. 8:

"Fyri bygging á ognunum fram við Dr. Jakobsens gøtu, frá gamla kirkjugarðinum, og Sverrisgøtu niðan í Tinghúsvegin, kann byggivaldið geva serloyvi til bygging, sum tað metir hóskandi til at stimbra gøtuna sum handilsgøtu /gongugøtu."

Endaliga mælir býararkitekturin til, treytað av at broytingin av byggisamtyktini verður framd, at nevndin tekur undir við uppskotinum um at gera eina heildarætlan fyri økið, har byggistig og nettonýtslustig verða ávikavist 0,8 og 2,0.

Kravið um útvegan av fleiri parkeringsplássum í sambandi við meirbygging, verður slept, og avroknað sum ásett gjald fyri skipan av parkeringsplássum í nærøkinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. juni 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum um at gera heildarætlan fyri økið og at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini sambært framløgdum kortskjali j. nr. 200401464-4.

Harumframt samtykti nevndin, at niðasta hædd skal verða til útatvenda nýtslu (handil ella matstovur), og at gongubreytirnar skulu verða yvirdekkaðar við markisum ella karnappum.

**Býráðið 24. juni 2004:** Fyrst var atkvøtt um tilmælið frá Jógvani Arge um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddu: Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen.

Ímóti atkvøddu: Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Jákup Suni Joensen, Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen og Tórfinn Smith.

Síðan var atkvøtt um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið var samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Jákup Suni Joensen, Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Leivur Hansen.

**Ískoyti:**
Svar er nú komið frá landsmyndugleikunum um broytingina av byggisamtyktini, har broytingarnar bert lutvíst verða góðkendar.

Innlendismálaráðið hevur góðkent, at tann parturin av Dr. Jakobsens gøtu, sum var í A1 øki, verður broyttur til 1. grundumráðið.

Ætlaða uppískoyti í ásetingarnar fyri 1. grundumráðið

*"Fyri bygging á ognunum fram við Dr. Jakobsens gøtu, frá gamla kirkjugarðinum, og Sverrisgøtu niðan í Tinghúsvegin, kann byggivaldið geva serloyvi til bygging, sum tað metir hóskandi til at stimbra gøtuna sum handilsgøtu /gongugøtu."*

bleiv ikki góðkent.

Ætlanin við hesi broyting er at loyva hægri bygging fram við "nýggju handilsgøtuni". Fyri at hesin parturin av broytingini skal kunna góðkennast, og heildarætlanin fyri "nýggju handilsgøtuna" skal kunna fremjast, er neyðugt at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

Heildarætlanin loyvir matriklunum, ið marka upp til Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu, eitt byggistig uppá 0,8 og eitt nettunýtslustig uppá 2,0.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at umsitingin ger eina serstaka byggisamtykt fyri Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu við grundarlagi í heildarætlanini fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot er gjørt til serstaka byggisamtykt fyri Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu við grundarlagi í heildarætlanini fyri økið er gjørd og verður løgd fyri nevndina.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir byggisamtyktina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**197/05** <u>**2005-0201**</u>

<u>**Val av ferðslunevnd**</u>

**Býráðið 27. januar 2005:** Útsett.

**Býráðið 17. mars 2005:** Málið beint í teknisku nevnd.

Støða skal verða tikin til uppskot til reglugerð til ferðslunevndina:

1. Ferðslunevndin tekur avgerðir um ferðslujavnandi tiltøk v.m. sambært §§ 47, 48, 50, 52 og 60 í ferðslulógini.
2. Nevndin verður myndað av einum umboði fyri Tórshavnar kommunu, Føroya Landfúta, Ráðnum fyri ferðslutrygd og Bileftirlit Føroya. Skrivari í nevndini er starvsfólk hjá Tórshavnar kommunu.
3. Verða umboðini ósamd, verður málið lagt fyri stovnsleiðararnar. Kunnu teir heldur ikki semjast, tekur Føroya landsstýri avgerð sambært ferðslulógini.

**Býráðið 15. september 2005:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 22. september 2005:** Ein meirluti, Leivur Hansen, Katrin Dahl Jakobsen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at mæla býráðnum til at velja býarverkfrøðingin og formannin í teknisku nevnd í ferðslunenvdina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, mælir staðiliga frá, at formaðurin í teknisku nevnd situr sum limur í eini fakligari nevnd, sum skal ráðgeva teknisku nevnd.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Tikið av skrá.

**198/05** **<u>2004-0893</u>**

**<u>Reglugerð fyri húsdjórahald (flogfenað) í Tórshavnar kommunu</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Kommunan fær av og á klagur frá fólki um húsdýrahald (j. nrr. 200302270, 200002834, 200000935 og 200200227). Serliga hevur talan verið um flogfenað, ið er til ampa fyri grannar. Tískil varð samtykt 4. mars 2004 í heilsu- og umhvørvisnevndini (sí mál 200302270) at gera eina reglugerð, sum virkar fyri, at so lítil ampi stendst av húsdýrahaldi sum gjørligt.

**Heimild:**
KUNNGERÐ NR. 53 FRÁ 03.05.1994 UM UMHVØRVISREGLUR.

*§ 23. Húsdýrahald. Í býum, býarlíkum bygdum og í meira býarlíkum býlingum kann bý- ella bygda(r)ráðið gera av, at húsdýrahald ikki er loyvt uttan góðkenning frá bý- ella bygda(r)ráðnum.*

*Stk. 2. Um so er, at húsdýrahald, sum ikki er umfatað av kap. 5 í løgtingslóg um umhvørisvernd, elvir til ampa, sum t.d. stink, gang, nógva flugu, nógva rottu, kann bý- ella bygda(r)ráðið geva boð um, at neyðug tiltøk skulu setast í verk til at fyribyrgja hesum, og í førum, tá ið ikki verður gjørt eftir boðunum, seta forboð fyri dýrahaldinum.*

*§ 26. Bý- ella bygda(r)ráðið kann áseta nærri reglur um bygging og reinhald av fjósum, stallum, seyða-, høsna- og dunnuhúsum, køstum, mykju-, súrhoyggja- og landbrunnum o.t. Bý- ella bygda(r)ráðið kann geva boð um neyðug tiltøk og steðga byggingum, um reglurnar ikki verða fylgdar.*

Støða skal takast til, um reglugerðin (j. nr. 200400893-3) skal sendast til hoyringar í teimum ymisku bygdarnevndunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við reglugerðini, og at reglugerðin verður send til hoyringar í teimum ymisku bygdanevndunum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. september 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Kaldbaksnevndin 4. oktober 2004:** Nevndin mælir til, at reglugerðin kemur at fevna um Kaldbak.

**Hvítanesnevndin 4. oktober 2004:** Kunnað var um uppskotið til reglugerð. Nevndin tekur undir við, at Hvítanes verður hildin uttanfyri.

**Kollfjarðarnevndin 7. oktober 2004:** Samtykt at taka undir við reglugerðini.

**Nólsoyarnevndin 1. februar 2005:** Nevndin mælir til, at reglugerðin kemur at fevna um Nólsoy.

**Hest-koltursnevndin 2. februar 2005:** Nevndin mælir til, at reglugerðin kemur at fevna um Hest og Koltur.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 14. februar 2005:** Útsett.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 23. mai 2005:** Nevndin tekur undir við, at Kirkjubøur og Velbastaður verða hildin uttanfyri.

**Ískoyti:**
Reglugerðin hevur verið til hoyringar í teimum ymisku bygdanevndunum og hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Støða skal takast til, um reglugerðin skal fevna alla kommununa, ella um reglugerðin ikki skal fevna bygdirnar Norðradal, Syðradal, Velbastað og Kirkjubø eftir ynski frá teimum avvarðandi bygdanevndum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 27. september 2005:** Samtykt at mæla býráðnum at seta reglugerðina í gildi í Tórshavnar kommunu treytað av góðkenning frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, tó skal reglugerðin ikki fevna um bygdirnar Hvítanes, Norðradal, Syðradal, Velbastað og Kirkjubø.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**199/05** **2005-1685**

**Viðvíkjandi viðtøkur fyri Eigarafelagið Maritugøta, Hoyvík.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Advokatfelagið Yviri við Strond 4 biður um góðkenning av viðtøkunum fyri eigarafelagið Maritugøta, Hoyvík.

Mælt verður til hesar broytingar:

§ 2, A: Viðtøkurnar viðvíkja bæði matr.nr. 137a, 137d og 137e, Hoyvík.
§ 2, C: Stk 2, Virksemið og heimildir felagsins eru soleiðis ongantíð galdandi á sjálvum matr. nr. 137a, Hoyvík. Hesin setningur skal strikast.

Øll fríøkini verða løgd saman til eitt matrikulnummar tá útstykkingin er liðug. Hvat matrikulnummarið verður, veit Matrikkulstovan ikki, tað er ikki útilokað, at matrikulnummarið verður 137a, Hoyvík.

§ 7, 5. reglubrot, skal ”*ella avtøku av felagnum”* strikast.
§ 7, 7. reglubrot, skal broytast til ”Felagið kann ikki avtakast”.
§ 8, 2. reglubrot, ”N*evndarpeningur verður um neyðugt at áseta av kommununi”,*skal strikast

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at góðkenna viðtøkurnar fyri Eigarafelagið Maritugøta, Hoyvík, við omanfyri nevndu broytingum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. september 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**200/05** **2003-1757**

**Viðvíkjandi viðtøkur fyri Eigarafelagið við Kirkjustræti.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Advokatskrivstovan biður um góðkenning av viðtøkum fyri Eigarafelagið við Kirkjustræti.

Mælt verður til hesar broytingar:

§ 2, A) Viðtøkurnar viðvíkja bæði matr.nr. 135fæ og 135 gd, Hoyvík.
§ 7, 5. reglubrot skal "*ella avtøku av felagnum*" strikast.
§ 7, 7. reglubrot skal broytast til "Felagið kann ikki avtakast".

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at góðkenna viðtøkurnar fyri Eigarafelagið við Kirkjustræti við omanfyri nevndu broytingum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. september 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**201/05** **2005-2003**

**Umsókn frá KJ Contractors um byggiloyvi til 6 "punkthús" á matr.nr. 1119, 1120 og 1118a, "Undir Fjalli", Tórshavn.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
KJ Contractors hevur saman við øðrum søkt um loyvi at byggja høg hús úti Undir Fjalli. Fyrsta uppskotið frá 2002 varð havnað, tí ov stórt frávik var. Nú hevur felagið gjørt nýggja ætlan, sum umfatar bygging av sokallaðum punkt húsum. Talan er um hús við kjallara, trimum hæddum og innrættaðum lofti. Á hvørjari hædd, og á loftinum verða 3 íbúðir. Kjallararnir verða nýttir til goymslu o.a.

Umsóknin er nýhugsan, og fellur væl inn í lendið, og hóskar væl til føroyskan byggisið.

Byggiætlanin er í A2 økinum, høg bústaðarbygging, og verður á matr.nr. 1118a, 1119 og 1120. Umsøkjarin hevur fingið tilsøgn frá tveimum eigarum, men neyðugt er, at Tórshavnar kommuna selur part av matr.nr. 1119.

**Lógir og ásetingar:**
Økið liggur í umráðispartinum A2, høg bústaðarbygging.

**Upplýsingar frá fyrisitingini:**
Grundstykkið, verður uml. 15000 m².
Ábygd verða punkthús.
Nettonýtslustigið verður 0,5, mest loyvda nettonýtslustig er 0,5.
Tal av bilstøðlum: 1,5 fyri hvørja íbúð.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Skjøl:**
Umsókn j. nr. 2005-2003/1.
Tekningar j. nr. 2005-2003/2.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at ganga umsóknini á møti vísandi til, at hetta er nýhugsan og nýskapandi góður byggisiður í kommununi.

Harumframt mælir býararkitekturin til, at Tórshavnar kommuna selur umleið 5100 $m^2$ av matr. nr. 1119, ið liggur í økispartinum A2, og ein geira til veg, breidd 8 til 12 m niðan til omanfyrinevnda part. Víddin av vegøki verður umleið 1200 $m^2$.

Mælt verður til at nevndin fer á staðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Byggi- og býarskipanarnevndin ásannar, at umsóknin frá KJ-Contractors um 6 punkthús við 12 íbúðum hvør í A2 økinum millum Horna er áhugaverd og tiltrongd í býarmenningini.

Byggi- og býarskipanarnevndin beinir spurningin um sølu av kommunalari ogn til verkaætlanina í fíggjarnevndina at avgreiða.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Samtykt ikki at ganga umsóknini á møti, men at mæla býráðnum til at bjóða matr. nr. 1119, sum er byggilendi, til almenna sølu.

Sølan er treytað av at nóg høgt boð fæst, og at bygt verður á økinum innan 2 ár frá søludegnum.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**202/05** **2001-0643**

**Samanbinding av bryggjunum á Langasandi í Kollafirði.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
**Tørvur:**
Í 2000, áðrenn samanleggingina millum Tórshavn og Kollafjørð, varð farið undir at gera ein 100m langa bryggju á Langasandi í Kollafirði. Hendan bryggjan bleiv gjørd, í sambandi við at ein stór frystigoymsla bleiv bygd á havnaøkinum.
Fyri at kunna nøkta tann tá akutta tørvin, bleiv bryggjan bygd 60m eystan fyri tað verðandi bryggjuna, framman fyri virkinum hjá Vestsalmon.

Í 2002 var farið undir at gera eina nýggja bryggju 100m eystan fyri bryggjuna framman fyri frystigoymsluni. Meðan hendan bryggjan var í ger, bleiv uppisjóvarvirkið hjá Kollafjørð Pelagic bygt.

Aftan á eina heldur stirvna byrjan, er rættulig gongd komin á virksemið á havnaøkinum.

Í 2003 vóru inntøkurnar fyri havnina í Kollafirði uml. 1,3 mió. kr.
Í 2005 eru inntøkurnar fyri havnina í Kollafirði mettar til 3,7 mió. kr.

Við verandi umstøðum, er bert møguligt at avgreiða 2 skip samstundis. Hetta ger, at tað oftani er trupult at avgreiða skipini, sum máa bíða, ella fara aðrastaðni.

Í september 2005, verður ein nýggj skerilinja tikin í brúk á uppisjóvarvirkinum, sum kemur at viðføra enn meira skipaferðslu.

Í felagsskrivi frá Kollafjord Pelagic, Kloosterboer og Samskip, dagfest 20. juni 2005, verður víst á ein vaksandi tørv á bryggjuplássi. Fyri at betra um umstøðurnar, mæla feløgini til, at byggja bryggjurnar saman, bæði millum Vestsalmon og Kloosterboer og millum Kloosterboer og Kollafjord Pelagic. Eisini mæla feløgini til at víðka um havnaøki eystan fyri Kollafjord Pelagic.

Tórshavnar havn tekur undir við felagsskrivinum, og mælir í fyrsta umfari til, at bryggjurnar verða bygdar saman. Hóast tørvurin á størri øki eystan fyri Kollafjord Pelagic uttan iva kemur at vísa seg, verður mælt til at hetta verður útsett, og tikið uppaftur sum eitt sjálvstøðugt projekt.

**Úrdrag úr byggiprogrammi:**
Ein 60 m long bryggja millum Vestlaks og Kloosterboer, við 9,8 m dýpi.

Ein 100 m long bryggja millum Kloosterboer og Kollafjord Pelagic við 12m dýpi.

Bryggjurnar verða gjørdar úr spunsi, eins og verðandi bryggjur.

Útbyggingin broytir onki um umhvørvið, men ger økið meira ruddiligt.

Neyðugar instalatiónir verða lagdar í bryggjuna, so sum vatn, el og tangi til móttøku av dálkaðum vatni frá skipum.

Útbyggingin ávirkar ikki ferðsluna á havnaøkinum nevnivert.

Projektið er mett at kosta 22,6 mió. og byggitíðin er umleið eitt ár.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at taka undir byggiprogramminum, og at beina málið víðari sambært mannagongd fyri verkætlanir hjá havnanevndini.

**Havnarnevndin 29. august 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollfjarðarnevndin 12. september 2005:** Nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá havnameistaranum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Samtykt at taka undir við byggiprogramminum og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**203/05** **2005-1122**

**Ábøtur á Niels Finsens gøtu frá Vaglinum niðan til Steinatún.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sum partur av støðuga arbeiðnum at halda við líka og bøta um viðurskiftini í miðbýnum og ásannandi, at verandi flísalegging á Niels Finsens gøtu er í ringum standi, hevur umsitingin gjørt uppskot til nýtt snið, tilfar og skipan. J. nr. 2005-1122.

Uppskotið leggur upp til, at ein 1-sporað koyribreyt verður asfaltløgd, endað við trimum røðum av chausses-steinum. Millum koyribreytina og gongubreytina verður skipaður ein geiri, har ljós, beinkir, ruskspannir og skeltir skulu verða. Lagt verður upp til, at flísarnar á gongubreytini verða skiftar til sama slag, sum er á gongubreytunum í miðbýnum annars - betongflísar við chausses-steinum ímillum.

Uppskotið leggur upp til, at gosvatnið á vegamótinum Sverrisgøta/ Niels Finsens gøta verður burturbeint, og tískil skal avgerð takast um, hvørt arbeiðið skal gerast í einum tveimum stigum.

Um so er, at avgjørt verður at gera arbeiðið í stigum, kann 1. partur vera at leggja asfalt, chausses-steinarnar og seta upp nýggjar lampur og beinkir á tveimum teinum - av Vaglinum niðan til gosvatnið og frá gosvatninum niðan í Steinatún. Sí kortskjal 1. stig.

2. partur kann so vera at skifta flísarnar á gongubreytunum og at beina gosvatnið burtur. Sí kortskjal 2. stig j. nr. 2005-1122.

Ætlanin er at byrja arbeiðið sum skjótast.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir uppskotið og beinir málið í býráðið um teknisku nevnd.

Somuleiðis mælir býararkitekturin til, at nevndin beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina í samband við at játta kr. 900.000 til endamálið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. mai 2005:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina at arbeiða víðari við málinum at leggja fyri aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Umsitinging hevur gjørt eitt nýtt uppskot. Í staðin fyri asfalt verða brúgvasteinar nýtt sum belegning.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Samtykt at taka undir við nýggja tilmælinum og at kunna grannarnar í góðari tíð.

**Uppískoyti:**
Umsitinging hevur saman við HMP consult gjørt útbjóðingartilfar. Mett verður, at samlaði kostnaðurin verður 1.568.100 kr. íroknað mvg.

Mælt verður til at góðtaka uppskotið og at mæla fíggjarnevndini til at játta peningin umvegis teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Leivur Hansen og Sjúrður Olsen, tekur undir við uppskotinum og beinir málið í teknisku nevnd.

Somuleiðis samtykti meirilutin at beina málið í fíggjarnevndina í sambandi við fíggjan av konto fríðkan av býnum 2005/2006 og at hava kunnandi fund við grannarnar.

Ein minniluti, Jan Christiansen, mælir til, at kunnandi fundur verður við grannarnar, áðrenn málið verður viðgjørt í fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Umsitingin hevur havt kunnandi fund við grannarnar tann 28. september 2005.

Samtykt at mæla býránum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 1.568.000 av íløgum.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**204/05** **2005-2292**

**Parkeringsøki á Skarðshjalla til tung akfør**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Byggi- og býaskipanarnevndin samtykti 28. februar 2005 (í máli nr. 2004-1892) at vinnuøkið til last- og bussbilaeigarar verður útvegað á Skarðshjalla og samtykti at mæla býráðnum til at skipa slíkt øki á Skarðshjalla sum alment p-pláss fyri bussar og lastbilar.

**Tekniska nevndin 22. september 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við samtyktini í fíggjarnevndini 9. mars 2005, í máli nr. 2004-1892 og at umsitingin letur gera uppskot til alment parkeringspláss og endurskoðaða kunngerð um parkering í Tórshavnar kommunu at leggja fyri teknisku nevnd aftur.

**Ískoyti:**
Víst verður j. nr. 2004-1892 har fíggjarnevndin samtykti 9. mars 2005 at taka undir við hugskotinum um almenna parkering til tunga ferðslu á Skarðshjalla og at leggja málið fyri nevndina aftur við ætlan fyri skipan av økinum og kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at kommunan keypir stk. nr. 1 í útstykkingini á Skarðshjalla, sum er 2.350 m² fyri kr. 620 pr. m², íalt kr. 1.457.000, at fíggja av konto 83.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**205/05** **2004-1118**

**Licitatión - Endurnýtslan á Hjalla**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Heilsu- og umhvørvisnevndin samtykti hin 5. februar 2004 at játta kr. 1,0 mió. av íløgum 2004 til gerð av bygningi til móttøku, viðgerð og goymslu av serliga dálkandi burturkasti á endurnýtsluni á Hjalla, sí j. nr. 200400104.

Tørvurin á einum slíkum bygningi er eyðsýndur. Núverandi umstøður til vandamikið burturkast eru ikki nøktandi og liva ikki upp til nútíðar krøv, ið avvarðandi myndugleikar seta til tílíkt virksemi. Nevnast kann, at bæði Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Arbeiðseftirlitið hava átalað umstøðurnar til vandamikið burturkast.

Tekniska fyrisitingin hevur saman við Arkitektavirkinum Magnusi Hansen gjørt projektuppskot til ein bygning, ið hevur hesar funktiónir:

- Móttøka, viðgerð og goymsla av vandamiklum burturkasti.
- Pláss til at avskipa serligt burturkast (vandamikið, elektronikk o.t.).
- Amboðsgoymsla.
- Kundamóttøka/kontrollsentur, har ið skráseting/gjalding fer fram.
- Skrivstovupláss til plássleiðaran.
- Fólkarúm, so sum tekøk, toilett, skiftirúm, baðirúm, reingerðarúm.
- Skrivstovuhøli til fyrisiting (leiðaraskrivstova, trý skrivstovupláss, fundar-/frálæruhøli, toilett og matstova).

Byggingin verður mett at kosta íalt kr. 5,9 mió., alt íroknað, eisini 6,25% mvg. Og kr. 5,4 mió. tá innrættingin av ovaru hæddini ikki er við.

Hjálagt er projektuppskot frá Magnusi Hansen, j. nr. 200401111-1, tekningar dagfestar 15. apríl 2004.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til:

at taka undir við projektuppskotinum
at nýta uml. kr. 700.000 av tí sum er framflutt frá íløgunum 2003 (sum játtað varð til liðuggerð av endurnýtsluplássinum) til arbeiðið, soleiðis at tað verða kr. 1,7 mió. tøkar í ár.
at alt verður bjóðað út í senn í innbodnaðari høvuðsarbeiðstøku, uttan innrætting av ovaru hædd til skrivstovuhøli.
at heita á fíggjarnevndina um at játta restina kr. 3,7 mió.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. mai 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum, tó so, at heitt verður á fíggjarnevndina um at taka hædd fyri restkostnaðinum við komandi fíggjarlógarviðgerð.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 24. juni 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út í innbodna licitatión millum hesar arbeiðstakarar:

- Articon, P/F, Tórshavn
- J & K Petersen, P/F, Tórshavn
- Guttesen og Staksberg, PF, Tórshavn
- Karstin A. Joensen, Sp/F, við Sjógv, Kollafjørður
- ÁTS, Sp/F, v/Karstin Vang, Kaldbak

Licitatiónin er ásett at verða 31. januar 2005, kl. 15.00.

Tilmælið verður sent limunum frammanundan fundinum ella framlagt á fundinum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 3. februar 2005:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Útsett.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 3. mars 2005:** Kunnað varð um gongdina í málinum. Umsitingin arbeiðir víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um málið

**Tilmæli:**
Bygginevndin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur undir við at gera uppskot til broyttan bygning, ið lýkur fíggjarligu treytirnar, sambært avtalu við ráðgevan.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 7. apríl 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og býararkitektinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við broyttar fíggjarligar raðfestingar í kommununi, verða fleiri av teimum ætlaðu út- og umbyggingunum við brennistøðina á Hjalla útsettar. Orsakað av hesum hevur leiðslan valt at gera nakrar umprioriteringar á økinum hjá brennistøðini á Hjalla.

Eitt úrslit av hesum er m.a., at goymslan av dálkandi burturkasti kann verða í høllini við síðuna av siloini og mett hevur verið, at rættast er at bíða við at gera skrivstovuhølini, sum ætlanin var at gera á ovaru hæddini í bygninginum til endurnýtsluna.

Uppskotið frá bygginevndini er tí, at ein øðrvísi bygningur enn fyrr ætlað verður bygdur á endurnýtsluplássinum.

Bygginevndin hevur gjørt uppskot til eina nýggja byggiskrá, sum verður løgd fram á fundinum.

Í sáttmálanum við ráðgevandi arktektin stendur m.a., "um veruligi kostnaðurin víkir meira enn 10% frá kostnaðarmetingini, hevur ráðgevin, uttan eyka samsýning, skyldu til at broyta projektið, so frávikið ikki verður meira enn 10%".

Men um samtykt verður at byggja ein annan bygning, verður tað torført at gera hetta kravið galdandi. Hetta tí at tað er ein onnur uppgáva at formgeva ein nýggjan bygning enn at broyta og skera burtur av einum verandi projekti.

Uppskotið frá bygginevndini er at taka upp samráðingar við ráðgevaran um at gera eitt skitsuprojekt til ein nýggjan bygning fyri ein hóskandi tímasats og bjóða Guttesen og Staksberg, sum vunnu lisitatiónina, við í eitt samarbeiði at detailprojektera og byggja nýggja bygningin fyri ein frammanundan avtalaðan kostnað.

**Tilmæli:**
Bygginevndin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur undir við nýggju byggiskránni, og at bygginevndin tekur upp samráðingar við Magnus Hansen, ark., og Guttesen og Staksberg um í samarbeiði at byggja nýggja bygningin.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 21. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 22. september 2005:** Málið var umrøtt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur nú havt samráðingar við Guttesen & Staksberg um gerð av broyttum bygningi sambært nýggjum skitsuprojekti hjá Magnusi Hansen, ark., ið er gjørt við støði í endurskoðaðu byggiskránni.

G&S vil gera bygningin fyri beint undir 4,5 milliónir uttan MVG.

Fíggjarætlanin sær soleiðis út:

| | | |
| --- | --- | --- |
| Tilboðsupphædd | kr. | 4.500.000 |
| Óvæntað og møguligar broytingar | - | 450.000 |
| Projektering | - | 713.250 |
| Samlað uttan MVG | kr. | 5.663.250 |
| | | |
| Samlað við 6,25% MVG | kr. | 6.017.203 |
| | | |
| Innbúgv meting uttan MVG<br>kr. 100.000 | | |
| | | |
| Innbúgv meting við 6,25% MVG | kr. | 106.250 |
| Tilsamans við 6,25% MVG | kr. | 6.123.453 |
| Íløgur játtaðar í 2003 og 2004 | | |
| Framflutt tilsamans | - | 1.700.000 |

Neyðug játtan til íløgu kr. 4.423.453

**Tilmæli:**
Bygginevndin og býararkitekturin mæla nevndini til:

at góðkenna nýggja projektið, og at sáttmáli verður gjørdur við Guttesen og Staksberg um at gerð av bygninginum.
at heita á býráðið umvegis fíggjarnevndina um at játta kr. 4.423.453 av íløguætlanini í 2005 og 2006.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 27. september 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og býararkitektinum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**206/05** **2004-2179**

**Skriv frá skúlastýrinum í Argja skúla um at leggja graslíki á vøllin niðanfyri skúlan á Argjum**.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í skrivinum verður sagt, at vøllurin er tilhaldsstaðið hjá ungdóminum úti á Argjum í frítíð eins og í skúlatíð.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2004:** Samtykt at heita á umsitingina at arbeiða víðari við málinum, og at seta pening av á íløgunum á skúlaøkinum 2005.

**Ískoyti:**
Landsbyggifelagið hevur boðið arbeiðið út og sigur í skrivi, dagfest 8. juli 2005.

**"Viðv.: Graslíkisvølli við Argja skúla.**
Álegging av graslíki er boðið út og heitt varð á teir bjóðandi, í útbjóðingarskrivi, dagfest 26.05.2005, um at geva tilboð uppá graslíki av slagnum Hockeygras uttan sand, hetta fyri at halda viðlíkahaldsútreiðslurnar av vøllinum á einum so lágum støði sum gjørligt og fyri at sandur/gummi ikki skuldi verða drigin inn í skúlan og harvið vaksa um reingerðina av skúlanum.

Eisini var biðið um gummigranulad undirlag útlagt á staðnum í ymiskari tjúkt (úr 20 til 40mm), fyri at kunna regulera smærri ójavnar í verandi asfalti.

Inn komu trý tilboð, frá Polytan, frá Scansis og frá Føroya Møblasølu, sum liggja í málinum.

Tað er bara Polytan sum gav tilboð uppá graslíki uttan sand, sum biðið var um. Harafturat hava teir, umframt 25 mm gummigranulat undirlag útlagt á staðnum, eitt eyka upprættingarlag við í tilboðnum fyri kr. 85.280,-.

Tilboðið frá Polytan er uppá kr. 386.400,00 + 85.280,00 íalt kr. 471.680,00.

Út frá tí, at Polytan hava givið boð uppá graslíki uttan sand, sum biðið er um í útbjóðingini, mælir Landsbyggifelagið til, at tikið verður av tilboði teirra.

Útreiðslurnar til hegn, ljós og eftirlit verður mett til kr. 425.000,00 v/mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum frá Polytan kr. 471.680,-, tá er íroknað upprættingarlag fyri kr. 85.280,00, og at játta kr. 900.000,00 av íløgum á skúlaøkinum.

**Mentamálanevndin 21. september 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og senda málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at kostnaðurin verður tikin við í projektinum fyri útbygging av Argja skúla.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**207/05** **2005-1663**

**Uppskot til reglur fyri upptøku og viðgerð av umsókn um vinnustykki.**

1. Umsøkjarin verður skrásettur á lista til vinnustykki í raðfylgju eftir umsóknardegi og umhvørvisflokki.

2. Fyri at persónur kann vera skrásettur á listan til vinnustykki, skal hann vera fyltur 18 ár.

3. Umsøkjarin kann velja at seta seg fyri vinnustykki í hesum økjum:

   a) Tórshavn,
   b) Hoyvík
   c) Argir
   d) Kaldbak
   e) Kollafjørður og Signabøur
   f) Velbastaður
   g) Kirkjubø

h) Nólsoy
i) Hest
j) Norðradalur

4. Til ber at standa skrásettur til fleiri vinnustykki. Tá skal umsókn latast inn fyri hvørt vinnustykki sær.

5. Umsøkjari, ið stendur fremst á listanum, har økið er raðfest, og flokkurin er tann rætti, fær fyrst tillutað vinnustykki.

6. Tá umsøkjari hevur tikið av bodnum vinnustykki, verður viðkomandi umsókn strikað av listanum.

7. Umsøkjari, ið ikki tekur við bodnum vinnustykki fyrstu ferð, kann verða standandi á listanum, um hann ynskir tað, og verður hann standandi á sama stað, men verður settur í bíðistøðu í 12 mánaðir.

8. Um umsøkjari ikki tekur við bodnum vinnustykki aðru ferð, verður viðkomandi umsókn flutt aftast í flokkinum.

9. Letur umsøkjari vinnustykkið inn aftur, kann hann koma á listan aftur, men skal søkja av nýggjum.

10. Er umsøkjari ikki byrjaður at byggja á tillutaðum vinnustykki 1 ár eftir, at fyribilsskeytið er undirskrivað, matrikulering framd ella byggibúningin er liðug, kann kommunan krevja vinnustykkið aftur við at rinda sama prís fyri vinnustykkið, sum umsøkjarin rindaði fyri stykkið.

11. Víkjast kann frá hesum reglum, tá ið talan er um serstakar grundir, ið býráðið kann góðkenna.

**Uppskot til umsitingarligar reglur fyri viðgerð um vinnustykki**

**Meginreglan:**
Er at øll kunnu skráseta seg á vinnustykkjalistan hóast viðkomandi ikki er skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroyum.

**Flokking:**
Allar útstykkingar og umsóknir til vinnustykki verða flokkaðar eftir umhvørvisflokki um fráleika til búðstaðarøki.

Útstykkingar kunnu flokkast, soleiðis at øll útstykkingin fær eina ella fleiri flokkingar, so sum 1-2-3, 3-4-5 og 5-6, eisini kann umsitingin gera av at flokka hvørt stykki sær, tó so at hugt verður eftir hvør vinna kemur inn á útstykkingina.

Umsóknir fáa bert eitt flokkingar nummar, fyri at kunna vísa til hvørji stykki eru júst til ta umsóknina.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til reglugerð við smávegis broytingum.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**208/05** <u>**1999-0267**</u>

<u>**Veiðifelagið Byrsumúli: Umsókn um leigu av øki á Sandvíkum**</u>

**Byggi-og býarskipanarnevndin 22. juni 1999:** Samtykt at ogna sær økið.

**Fíggjarnevndin 24. juni 1999:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið fyri læstum hurðum 24. juni 1999:** Samtykt við 12-0 atkvøðum.

**Ískoyti:**

- Økið uml. 22.825 m² er keypt frá Føroya Jarðarráð fyri 778.432,50 kr.
- Skeytið er ikki skrivað, tí Matrikulstovan í málsviðgerðini fekk áheitan frá Landsverkfrøðinginum um at vegagerðin oman til ítróttaøkið var kommunalur vegur.
- LV og tekniska deild hjá TK hava sett krøv til íbindingina í landsvegin og pláss til fráseting av bilum á økinum.
- Til hetta krevst uml. 2.600 m² at keypa afturat frá Føroya Jarðarráð.
- Keypsprísur og útreiðslur til matrikulering er uml. 110.000 kr.
- Afturat at kommunan ognar sær stykkið, eigur ein leiguavtala at gerast við Byrsumúla um leigu av økinum og við treytum, íð lúka krøvini hjá Heilsu-frøðiligu Starvsstovuni.
- Føroya Jarðarráð skal hava málið til ummælis og góðkenningar.
- Náttúrufriðingarmyndugleikin skal góðkenna vegagerðina.
- Kostnaður annars av vegagerð, parkering, hegning, rørportri, lendisarbeiði o.ø., sum kravt samb. teknisku deild og LV, er mettur til uml. 1.550.000. kr.
- Byrsumúli hevur ikki skipað fyri nakrari innanlendis kapping í nógv ár ella luttikið í uttanlandskappingum. Veiðufelagið Byrsumúli er ítróttarfelag og er ikki skrásett á Fútaskrivstovuni.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at kommunan ognar sær umleið 2.600 m² afturat verandi øki í Sandvíkum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. december 2000:** Samtykt at taka undir við umsitingini.

**Fíggjarnevndin 11. desember 2000:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið fyri læstum hurðum 14. desember 2000:** Samtykt við 11-0 atkvøðum at taka undir við fíggjarnevndini og at ogna sær umleið 2.600 m² afturat verandi øki í Sandvíkum.

**Ískoyti:**
Jógvan Páll Lassen, adv., er biðin um at senda proforma kæru til yvirfriðingarnevndina.

**Mentmálanevndin 7. februar 2001:** Samtykt at mæla býráðnum til at kæra málið til yvirfriðingarnevndina.

Jógvan Arge tekur støðu á býráðsfundinum.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2001:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 22. februar 2001:** Samtykt við 10-0 atkvøðum.

**Ískoyti:**
Veiðifelagið Byrsumúli hevur í skrivi, dagfest 21. november 2002, (j. nr. 200001749/4) heitt á Tórshavnar kommunu um at gera og rinda fyri atkomuveg til økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin ynskja, at nevndin tekur støðu til,

um Tórshavnar kommuna skal standa fyri at gera atkomuvegin til økið, har Byrsumúli skal halda til,
um kommunan skal gjalda fyri atkomuveg og p-pláss, og
um kommunan skal yvirtaka atkomuveg og p-pláss, tá ið arbeiðið er gjørt.

**Tekniska nevnd 3. juni 2003:** Nevndin samtykti at taka upp samráðingar við Landsverkfrøðingsstovnin fyri at finna eina meiri hóskiliga vegatekniska loysn á atkomuvegnum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur á fundi 24. juni 2003 við Landsverkfrøðingsstovnin borið fram ynski um at linka reglurnar fyri íbinding í landsveg.

Landsverkfrøðingsstovnurin hevur í teldubrævi, dagfest 18. august 2003, boðað frá, at reglugerðin fyri íbinding í landsveg als ikki kann linkast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at umsitingin letur gera nýtt uppskot at leggja fyri Landsverkfrøðingsstovnin til nýggja viðgerð.

**Tekniska nevnd 9. september 2003:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgevara latið uppskot gera, (mál nr. 200400502) og hildið innbodna lisitatión hin 19. februar 2004, (mál nr. 200400503).

Ráðgevin hevur latið gera eina listitatiónsprotokol (j. nr. 200400503/6), eina kostnaðarmeting (j. nr. 200400503/7) og eitt viðmæli (j. nr. 200400503/8). Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri alt arbeiðið (j. nr. 200400554/1).

**Tekniska nevnd 2. mars 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við fyriliggjandi projekti.

Eisini samtykti nevndin at mæla fíggjarnevndini til:

at taka av tilboðnum frá p/f Articon, sum hevði lægsta tilboð, álj. kr. 357.007,00 u/mvg.
at játta kr. 477.800,00 til alt arbeiðið, herundir eisini ráðgeving og mvg.

**Fíggjarnevndin 11. mars 2004:** Samtykt at játta kr. 480.000,00 av reguleringskontoini.

**Ískoyti:**
Formaðurin fyri teknisku nevnd og býarverkfrøðingurin vísa á, at lendið í Sandvíkum er eitt virðismikið náttúrulendi, við frálíkum frílendisnýtslumøguleikum. Økið er fjøruslætt, sum tað einsta í høvuðsstaðnum, við állum, kombikkum, sjósílum og fjøruhyljum. Har er veðurgott á meginættunum, har er Víkin fagra og har er gamla várgongurættin hjá hoyvíksingum, sum uttan iva er omanfyri 100 ára gomul. Har er eitt hitt størsta ternubøli her um leiðir, umframt annað ríkt fuglalív.

Harumframt er lendið lítið egnað til virksemið hjá einum skjótifelagsskapi. Um hugt verður til tær altjóða ásetingar, ið skulu verða nøktaðar, skal anleggið kunna nýtast til etableraða skjótiítrótt. Ikki minst er tað ein trygdarligur tvørleiki, at so stutt frástøða er til landsvegin.

Í grannalondunum er skjótiítróttargrein fyri børn, ungdóm og vaksin, og somuleiðis fyri brekað. Skjóting er ein stór og vælumtókt ítróttargrein, skipað undir ítróttarráðunum (svarandi til ÍSF og ÍSB), og við atgongd til stuðulspening (t.d. tippipengar).

Ítróttargreinin skal vera skipað, og góðkend anlegg (umhvørvisgóðkenning) skulu fevna um pistól skjóting (breyt við máli), rifluskjóting (breyt við máli) og um flogskjóting (leirdúgvur).

Støða ynskist verða tikin til um veiðufelagið Byrsumúli framhaldandi skal skjóta á økinum í Sandvíkum. Felagið hevur í skrivi til Tórshavnar kommunu, dagf. 2. juni 2005 (j. nr 1999-2667/73), víst á, at einki er til hindurs fyri at flyta virksemið á annað hóskandi øki.

Spurningurin er, um málið framhaldandi hoyrir heima í teknisku nevnd, ella um tað eigur at verða flutt yvir í mentamálanevndina/byggi- og býarskipanarnevndina sum eitt ítróttarmál.

Formaðurin fyri teknisku nevnd og býarverkfrøðingurin skjóta tí upp, at virksemið hjá Byrsumúla verður flutt frá Sandvíkum til annað stað.

Saman við nýggju upplýsingunum í málinum greiðir umsitingin frá fíggjarligu støðuni í sambandi við niðurstøðuna hjá fútarættinum 8. desember 2004. j. nr 1999-2667/71).

**Tekniska nevnd 7. juli 2005:** Ein meiriluti, Leivur Hansen, Sjúrður Olsen, Katrin Dahl Jakobsen og Høgni Mikkelsen, samtykti at halda fast við áður gjørdu samtyktir, tekur semjuna í Fútarættinum tann 3. desember 2004 til eftirtektar og samtykti at fíggja írestandi upphæddir til arbeiðið av rakstri.

Ein minniluti Marin Katrina Frýdal mælir til, at kommunan ávísir veiðifelagnum Byrsumúla annað hóskandi pláss til virksemi teirra vísandi til, at økið ynskist verða nýtt til rekreativt endamál.

**Ískoyti:**
Høgni Mikkelsen, býráðslimur, krevur málið fyri býráðið.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Atkvøtt varð um tilmælið frá Høgna Mikkelsen um at taka undir við teknisku nevnd tann 7. juli 2005 og at arbeiðið fer í gongd beinan vegin, varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Kári Árting, Leivur Hansen, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen

Ímóti atkvøddu: Hildur Eyðunsdóttir og Marin Katrina Frýdal

**209/05** **<u>2000-2098</u>**

**<u>Parkeringsviðurskiftini við kommunulæknaviðtaluna í J. Paturssonargøtu</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Kári Jacobsen, kommunulækni, hevur við skrivi, dagfest 20. mars 2002, heitt á sosialu nevnd um skjótast møguligt at fáa okkurt gjørt við vánaligu parkerings-viðurskiftini við kommunulæknaviðtaluna.

Málið hevur verið fyri á fleiri fundum í ferðslunevndini, og á seinasta fundi tann 5. februar 2002 varð mælt til at svara kommunulæknanum, at ongar broytingar skulu gerast á økinum.

**Sosiala nevndin 16. apríl 2002:** Samtykt at játta kr. 300.000,00 av íløgujáttanini til eldrarøkt 2002 og heita á byggi- og býarskipanardeildina um at seta arbeiðið í verk skjótast gjørligt.

Eisini samtykt at skelti verða sett upp við áskrift, at parkeringsøkið í viðtalutíð bert er til fólk í læknaørindi.

**Ískoyti:**
Biðið verður um at nevndin ger niðurstøðu í málinum.

**Ferðslunevndin 25. september 2003:** Nevndin staðfestir, at nevndarsamtyktin í sosialu nevnd 16. apríl 2002 ikki er í tráð við ferðslulógina, § 48, stk. 3, og mælir til at halda fast við niðurstøðuna í skrivi, dagfest 18.03.2002 (j. nr. 200002098/15).

Politimyndugleikin í ferðslunevndini átalar, at sosiala nevnd ger samtyktir, sum ikki hevur við sosialu nevnd at gera og vísir á ferðslulógina.

**Sosiala nevndin 4. november 2003:** Tikið til eftirtektar.

Samtykt at beina málið í teknisku nevnd við áheitan um at fáa parkeringsøkið skipað.

**Ískoyti:**
Høgni Mikkelsen, býráðslimur, krevur málið fyri býráðið.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið í teknisku nevnd.

**FUNDUR LOKIN KL. 19:55**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
| --- | --- | --- |
| Kári Árting | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Inga Dahl | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |